# Ársfrágreiðing 2023



# Grein – Politiklagumál í Føroyum og í Grønlandi

Politiklagumyndugleikin hevur síðan 1. januar 2021 haft heimild til at kanna og avgerða atburðarklagur umframt at eftirkanna fráboðanir um revisverd viðurskifti framd av løgreglufólki í Føroyum. Hin 1. januar 2023 fekk Politiklagumyndugleikin somu heimild í mun til grønlendsku løgregluna.

Hvat viðvíkur politiklagumálum í Gørnlandi er við atliti á at tryggja nóg hollan kunnleika til gørnlendsku viðurskiftini sett á stovn eitt ráð í Politiklagumyndugleikanum – Ráðið fyri Politiklagumál í Grønlandi. Ráðið stendur av einum forfólki, ið er sakførari, Britta Kjeldsen, umframt tveimum almennum umboðum, Pitsi Høeg og Sofia Rossen. Ráðið greiður í atburðarklagum og brotsmálum vegleiðandi frásøgn til Politiklagumyndugleikan til nýtslu fyri lýsingina av málinum.

Hvat viðvíkur málum úr Føroyum, kann Politiklagumyndugleikin útvega sær ummæli frá Málráðnum við atliti at, at greiða málsligar spurningar.

Politiklagumyndugleikin hevur í 2023 viðgjørt fimm mál úr Føroyum og 34 mál úr Grønlandi.

Politiklagumyndugleikin hevur ferðast til Grønlands tvær reisur í samband við tvey neyðsendingarmál. Neyðsendingarmál í Grønlandi verða kannaði á sama hátt eins og neyðsendingarmál í Danmark. Hetta hevur við sær, at kanningarfólk frá Politiklagumyndugleikanum rykkja út so skjótt, vit verða kunnaði um málið, tó við tí muni, at ferðatíðin til brotsstaðið sjálvsagt er munandi longri, og at tað ikki altíð er gjørligtl at ferðast sama dag. Politiklagumyndugleikin ferðaðist í samband við tey tvey neyðsendingarmálini til Grønlands saman við rættarlæknafrøðingum og brotstøkningi frá Ríkisløgregluni. Politiklagumyndugleikin hevur í 2023 eisini verið í Føroyum tvær reisur í samband við kanningararbeiði av teimum brotsmálum við atliti á at avhoyra meldaða, umframt avhoyring og vegleiðan av tí óræ ttaða.

Málini, ið tikin eru ímóti frá Føroym og grønlandi eru býtt í teir flokkar, ið eru ávístir á talvuni til høgru. ■

| Løgregludømi | Føroyar | Grønland |
|---|---|---|
| **Revsimál tilsaman** | **3** | **16** |
| Likamsálop | - | 6 |
| Víðariberan av persónligum upplýsingum | - | 2 |
| Myndugleikamisnýtsla | 1 | 3 |
| Aðrar fráboðanir um revsiverd viðurskifti | 2 | 5 |
| Flokkaði revsimál | - | - |
| **Ferðslumál tilsaman** | **1** | **7** |
| Sjávvirkið ferðslueftirlit | - | - |
| Ferðsluvanlukkur | 1 | 7 |
| Onnur ferðslulógarbrot | - | - |
| Flokkaði ferðslumál | - | - |
| Ferðslumál avgjørd í løgregludømunum | - | - |
| **Kanningar - § 1020 a, stk. 2** | **-** | **2** |
| Skotmál | - | 1 |
| Deyðsfall annars | - | 1 |
| Álvarsliga løstaði annars | - | - |
| **Atburðarklagur tilsaman** | **1** | **9** |
| Valdsnýtsla | - | 6 |
| Málbrúk | - | - |
| Rasisma/mismunur | - | 1 |
| Annar skeivur atburður | 1 | 2 |
| Viðurskifti áður viðgjørd sum revsimál | - | - |
| Flokkaði atburðarmál | - | - |
| **Innkomin politiklagumál í 2023** | **5** | **34** |

# Frásagnir – mál úr Føroyum

**Parkering hjá løgreglufólki var heimila**
3146-199-22

Eitt løgreglufólk (P) varð meldað fyri at bróta ferðslulógina í samband við parkeringar framdar við eitt ítróttarøki. Løgreglubilurin stóð í samband við tvær parkeringar parkeraður á tann hátt, at høgra hjólið var á gonguteginum, soleiðis at fótgangarar ikki sluppu framvið, eins og løgreglubilurin stóð parkeraður í, ella stóð í einum óyvirlítandi svingi. Hvør parkeringin hevði eina gildistíð á umleið 20 minuttir.

P greiddi millum annað frá at hon í báðum parkeringum stóð á staðnum av tænastuligum ávum í samband við ein fótbóltsdyst, har nógv fólk var savnað, og av hesi orsøk var av týdningi, at løgreglan "vísti andlit" fyri at tryggja frið og skil.

P greiddi harumframt frá, at patruljan ikki var sett á uppgávuna í samband við fótbóltsdystin, men at patruljan var til staðar av egnum starvssemi, og at tey vóru til reiðar at rykkja út, um eitthvørt bráðfeingis varð áfatt. Harumframt greiddi P frá, at har ikki vóru nógv parkeringspláss, at har ikki vóru onnur støð at parkera, og at "parkeringin í sjálvum sær var ólóglig". Tó vísti P aftur, at hon stóð til vanda ella ónáðir.

Ríkisákærin stillaði inn kanningina í málinum, og legði í hesum sambandi dent á, at parkeringin varð framd, meðan løgreglan framdi løgregluuppgávur, við tí at løgreglan var til staðar fyri at tryggja frið og skil. Parkeringin var tískil neyðug fyri at løgreglan slapp framat fótbóltsdystinum, av teirri orsøk, at har ikki vóru tøkir lógligir parkeringsmøguleikar nærhendis, har møguleiki var hjá løgregluni skjótt og uttan trupulleikar at fara av staðnum, um tey vórðu kallaði til eina uppgávu, ið hevði skund. Harumframt legði ríkisákærin dent á, at báðar parkeringar vardu umleið 20 minuttir, hvørt merkir, at løgreglubilurin ikki var parkeraður á staðnum longri enn hvat neyðugt er fyri útinnanina av løgregluuppgávuni.

**Løgreglufólk skuldsett fyri blúnisbrot**
317-807-23

Politiklagumyndugleikin hevur skuldsett eitt løgreglufólk (P1) fyri at hava framt blúnisbrot mótvegsi einum øðrum løgreglufólki (P2) við at hava borið fram blúnisbrótandi útsagnir og følt uppá P2.

Málið verður framhaldandi kannað. ■



# DEN UAFHÆNGIGE POLITIKLAGEMYNDIGHED

Den Uafhængige Politiklagemyndighed
Frederiks Plads 42, 8. og 9. sal, 8000 Aarhus C 41 78 35 00

grobowski.dk